## DAGSINS MEINING

# Haldið fingrarnar vekk

Eitt av feløgunum, ið er við í oljuleitingini við Føroyar, týska Veba, er dottið so dyggiliga í felluna hjá umhvørvisterroristinum, Paul Watson. Leiðslan í felagnum hevur av berum ótta fyri møguligum tiltøkum móti fyritøkuni, váttað fyri felagsskapinum Sea Shepherd, at hon vil gera sítt til, at føroyingar gevast við at drepa grind.

Sambart grein í Fregnum skal Veba hava svarað áheitan frá Sea Shepherd um at fáa føroyingar at gevast við grindadrápi, við at skriva »at Veba fer at virka fyri, at føroyingar fara at endurskoða sína mentan og gevast at drepa grind.« Um somu tíð vísir eitt nú Amerada Hess áheitanini frá sær.

Lat tað verða sligið fast við sjeytummaseymi, at útlendsk oljufeløg hava ongan rætt at leggja seg út í føroysk viðurskifti á slíkan hátt. Teirra uppgáva er at leita eftir olju og síðani í samstarvi við føroyskar myndugleikar at tryggja tann skilabesta útviklingin.

Í fyrstu atløgu kann tað tykjast sum eitt mistak, at eitt oljufelag á henda hátt leggur seg út í føroysk viðurskifti. Slíkt kann jú gera, at felagið verður óynskt her. Tá grundgevingin hjá felagnum fyri at ganga Paul Watson á møti so ella so er tann, at týska felagið ber ótta fyri, at tiltøk fara at verða sett í verk móti tess virksemi, gongur tað ikki Watson á møti, so eigur slíkt felag at endurskoða støðu sína í Føroyum. Vil tað virka fyri at steðga grindadrápi, ja so má tað fara aðrataðni at arbeiða. So einfalt er tað.

Tað stendur greitt, at oljufeløg, sum vilja gera íløgur í Føroyum, mugu ikki lata seg trýsta av felagsskapum sum Sea Shepherd, ið jú brúka allar hugsandi ólógligar og óreiðiligar metodur at røkka sínum máli. Sjálvandi kunnu vit hava ymsar áskoðanir um grindadráp, men hetta er ein lívsháttur føroyingar hava havt í árhundraðir. At grindahvalurin er dálkaður er ikki av okkara ávum, men tað eru ídnaðarlondini, eitt nú Týskland, sum hava skyldina. Tí var rættari at vent atfinningum móti teimum, sum dálka høvini og harvið eisini hvalin.

Føroyar hava brúk fyri oljufeløgunum at leita eftir olju her. Men tey hava eisini brúk fyri okkum, tí her møguliga finst olja. Tí er talan um eitt samstarv, sum má byggja á sínamillum álit. Í síðsta enda eru tað føroyskir myndugleikar og Føroya fólk, sum hava avgerandi orðið. Og har er grindamálið einki undantak. Tí eiga oljufeløgini at halda fingrarnar langt vekk frá Paul Watson og øllum royndum hansara at gera seg inn á føroyingar, føroyskan livihátt og mentan. Rættir tú Watson lítlafingur er greitt, hvør endin verður.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Stutt viðmerking til grein hjá Hans Paula Strøm

**Sámal Petur í Grund**
*landsstýrismaður*



Í Sosialinum og Dimmalætting hósdagin 16.august hevur Hans Pauli Strøm eina grein við ivirskriftini »Tað rakar ikki tykkum!«.

Í hesi greinini analyserar HPS. nøkur orð sum útvarpið í síni tíðindasending endurgav undirritaða fyri at hava sagt.

Orðini í útvarpinum vóru røtt endurgvin og vóru tey ein samandráttur av samrøðu útvarpsmaðurin hevði við undirritaða.

Í tíðindasendingini bleiv sagt frá hvussu arbeiði við eftirlønarspurninginum fer fram. Tað bleiv ikki nevnt við einum orði, at fakfeløgini ikki komu at vera við í gerðini av tí partinum av eftirlønarspurninginum sum hevur við arbeiðsmarknaðin at gera.

Harafturímóti bleiv sagt, at eitt uppskot bleiv gjørt í Almanna- og heilsumálastýrinum saman við øðrum pørtum sum reint tekniskt eiga at vera inni í myndini, tá eitt tílíkt uppskot verður gjørt.

Tá so uppskotið fyriliggur verða teir partar sum nátúrliga eiga at vera inni í myndini tiknir við í viðgerðina.

Hetta er ein mannagongd sum verður brúkt í flest øllum teimum málum sum stýrið arbeiðir við.

Greinin hjá HPS. byggir á eina analysu av tí sum tíðindamaðurin fekk burturúr samtaluni og ein tílík kann jú leggjast fram positivt ella negativt, alt eftir hvussu ein politiskt ynskir at raka.

HPS. hevur valt at gera hana negativa, tað er hansara valg, og skal undirritaði ikki leggja seg út í rætt hansara til hetta valg.

# Gamla kenda argingarlyndið hjá Sambandinum

**Jóannes Eidesgaard**



Nýggi formaður Sambandsfloksins fær tað at ljóða í einari blaðsamrøðu við Sosialin fyrradagin, at Javnaðarflokkurin nú hevur slept øllum sínum sjónarmiðum um fullveldið og búskapargrunn, og at tað nú bert er Sambandsflokkurin, sum verjir borg. Hetta er jú er púrasta burturvið og minnir mest um gamla kenda argingarlyndið, sum altíð hevur verið eitt av eyðkennunum hjá gamla Sambandsflokkinum. Eg veit ikki, um vit skulu vera glað ella ikki fyri hennara umsorgan og ótta, men eg má tó siga bæði henni og Sambandsflokkinum, at teimum ikki nýtist at hava slíka umsorgan fyri okkum og okkara politisku arbeiði, tí hesum skulu vit sjálvir uttan teirra hjálp taka av okkum av.

Blaðsamrøðan, eg sipi til, snýr seg um Búskapargrunn Føroya, har nýggi formaðurin hjá Sambandinum ta eina løtuni sigur, at hon als ikki vil viðgera málið, tí hon einki álit hevur á samgonguni, fyri síðan seinni í somu samrøðu at siga, at hugskotið við einum oljugrunni er so gott, at hon fegin vil kjakast við aðrar flokkar um grunnin, hvat so annars ein slíkur boðskapur merkir.

Javnaðarflokkurin hevur klárt og týðiliga boðað landsstýrinum frá, at taka teir ríkisveitingina og skiftisgrunnin burtur úr búskapargrunninum, soleiðis at hesin gerst ein veruligur oljugrunnur, sum skal hýsa oljuinntøkum, so eru vit til at tosa við. Hatta við álitinum á sitandi samgongu vil eg lata liggja hesaferð, men neyvan fara vit at geva sitandi samgongu nakra álitisváttan. Politiska uppgávan er nú einaferð at fáa ávirkan, og kunnu vit medvirka til eina skilagóða loysn við einum oljugrunn, so gera vit tað sjálvandi.

Karstin Hansen tykist hava skilt okkara boðskap um, at vit ikki góðtaka nakað við ríkisveitingini í einum búskapargrunn og enn minni nakað við nøkrum skiftisgrunni til at fíggja fullveldið. So tískil eru vit innstillaðir uppá at geva honum ein møguleika fyri at arbeiða fram ímóti einari breiðari semju.

Tað er eitt brot í samrøðuni við Lisbeth Petsresen, sum harmar meg eitt sindur, og har hon líkasum rør frammundir, at vit lata okkum lumpa til nakað, sum vit ikki vita, hvat er. Hon sigur:

»Tjóðveldisflokkurin hevur alt valskeiðið staðið nógv nærri at Javnaðarflokkinum enn at okkum. Tað hevur nokk allatíðina verið ætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum at fáa Javnaðarflokkin at taka undir við fullveldisætlanini. Og tí er skiljandi, at teir nú royna at lokka við at umdoypa grunnin. Men vit vita væl, at endamálið við grunninum framhaldandi er at fíggja fullveldið, og tað vilja vit sjálvsagt ikki vera við til.«

Spakuliga á sín stillføra hátt fær formaður Sambandsfloksins sagt, at Javnaðarflokkurin í síðsta enda nokk fer at taka undir við fullveldinum, og teir fara ikki at gáa eftir, at grunnurin álíkavæl skal fíggja fullveldið í síðsta enda. Teir eru ikki til at hava álit á, ljóðar hennara boðskapur, soleiðis sum eg lesi hasa samrøðuna.

Eg má siga sum er, at tað er ikki stór virðing Lisbeth Petersen her vísir okkum. Fyri tað fyrsta, at vit nokk fara at taka undir við fullveldinum, hóast vit saman við hennara flokki hava tikið tøk saman fyri tí mótsatta, og síðan at siga, at vit vit ikki fara at uppdaga, at grunnurin í síðsta enda fer at verða ein skiftisgrunnur.

Eitt sindur hugstoytandi at lesa, tá ein veit, hvar veruligi tøkini eru tikin í andstøðuni ímóti allari fullveldistilgongdini. Heldur ikki sørt hugstoytandi at hoyra Heðin Mortensen í Úvarpinum í gjár folda seg út sum tann stóri ígongdsetarin og taka sær æruna av spurningunum, sum nú verða settir landsstýrinum í samband við viðgerðina av sokallaðu Yvirtøkulógini í uttanlandsnevndini. Slíkt er ikki serliga loyalt, tó tað als ikki er ókent, tá tað snýr seg um Sambandsflokkin.

Eitt er, at Lisbeth Petersen beinleiðis sigur seg einki álit hava á samgonguflokkunum, men at hon heldur ikki hevur álit á okkum, kann so bert leiða okkum til, at hon bert hevur álit á sær sjálvum og egnum flokki.

Men tað mugu so vit í Javnaðarflokkinum taka til eftirtektar, hóast vit kundu ynskt eitt meira álitiskent samstarv serliga í andstøðuni.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Fregnir ikki tann rætti at sáa iva um trúvirðið hjá nøkrum

**Óli Jacobsen**



Eg havi í nógvum greinum kunnað dokumenterað, at Føroyar er eitt »lágprís« rættarsamfelag, bæði politiskt og umsitingarliga.

Bert í hesi samgonguni hevur verið prógvað, at FF í tveimum førum er sett uttan fyri lóg og rætt. Tað er eisini dokumenterað, at hetta er gjørt í stríð við tey rættarprinsipp, sum eru galdandi í restina av ríkinum og annars í einum veruligum fólkaræði. Men tað ófrættakenda er, hetta verður gjørt uttan fráboðan og frágreiðing. Ein og hvør roynd at fáa eina frágreiðing og grundgeving er sum at renna seg ímóti einum betongmúri. Øll skipanin, íroknað andstøða á tingi og fjølmiðlar eru so »sammenspist«, at slík rættarbrot móti borgarum verða tøgd í hel.



*Grundtankin í hesi tekning er ikki heilt langt burtur frá tí, sum Fregnir, og teir blaðið umboðar, standa fyri*

Men nú er Fregnir farið í aktión! Og tað er ikki við at viðgera hesi álvarsmál, sum blaðstjórin sum samfelagsfrøðingur skuldi havt serligar fortreytir fyri at viðgera. Nú ræður um at skapa iva um trúvirði hjá tí, sum loyvir sær at vísa á, hvussu Føroyar miðvíst verður avriggað sum rættarsamfelag. Og tað verður gjørt við einum gomlum primtivum tricki: »Tú skal bara halda kjaft. Tú sum hevur fingið so og so høga bíðiløn sum landsstýrismaður uttan at tala at.« Hóast hetta eru viðurskifti, sum eg onga sum helst ávirkan havi havt á.

Tað er sjálvsagt í lagi, at slík mál verða tikin upp. Eg skal fegin viðganga, at eg helt skipanina við bíðipening vera órímiliga, og hetta gjørdi eg eisini vart við í landsstýrinum. Men hetta kann so á ongan hátt broyta tað, sum eg havi skrivað um rættarstøðuna í Føroyum. Men hesi viðurskifti hevur Fregnir als ongan áhuga fyri. Nyrup er samb. Fregnir størsti »fani« av verðini, tí hann ikki skal yvirhalda demokratiskar spælireglur. Men at politisku bossarnir hjá blaðstjóranum nýta somu framferð móti egnum borgarum, sum kastað verður Nyrup fyri, skal ikki koma fram. Tí so sigi eg hitt!!

Og hervið koma vit til kjarnan í hesum máli, og tað er dupultmoralurin. Nýggja leiðslan í flokkinum hjá Fregnir hevur ført seg fram sum teir, ið skuldu umboða reinleika í politikki. Sjálvt »bróðurmorðið« á Signar á Brúnni hevur verið marknaðarført sum politiskur reinleiki á ein hátt, sum sjálvt ein Goebbels ikki hevði kunnað gjørt tað betri. Hetta var tó áðrenn »Fregnir«.

Dentur hevur verið lagdur á, at í fyrireikingini av tí nýggja paradísinum var tað av avgerandi týdningi at fáa eitt so breitt orðaskifti sum gjørligt millum borgarar. Tað sæst greiðari og greiðari, at hetta bert eru lótir. Hetta er enn einaferð váttað. Sjúrður Skaale er ikki annað enn ein rakkaraknektur hjá fólki, sum nýta "frælsi" sum páskot fyri at fáa makt sjálvi.

Tí er hann ikki tann rætti at seta spurnaðartekin við trúvirðið hjá øðrum!

# Almennur og kommunalur vinnupolitikkur

**Óli M. Lassen**



Tað er sera óheppið, um Kommunala eftirlitið kemur til ta niðurstøðu, at kommunurnar í Vestmanna og Kvívík skulu taka seg úr Vestmanna vinnuráð. Hinvegin er tað líka óheppið, at kommunurnar lata pening til eitt vinnuráð við tí endamálið, at vinnuráðið skal seta partapening í feløg í kommununum. Hetta er neyvan heilt í tráð við lóggávu á økjunum, men hinivegin skal tað helst verða soleiðis, at kommunurnar kunnu veita stuðul til vanlig vinnuráð í Føroyum. Her eru nógv øki, har kommunur kunnu stuðla fyri at menna vinnuumhvørvið og førleikan hjá tí einstaka virkjunum.

Í okkara grannalondum er tað sera vanligt, at har eru virkin vinnuráð, sum arbeiða fyri at menna tann einstaka býin ella økið. Slík vinnulívsráð finnast bæði í størri býum og á smærri plássum

Hesi vinuráð virka í tøttum samstarvi við kommunurnar, og eru kommunurnar oftani við til at reka hesi vinnuráð. Her kann nevnast at kommunan í Stavanger er við í rakstrinum av Stavanger Næringsforening við umleið 2 mió. kr.

### Almennur Økismenningarpolitikkur

Tá tosað verður um økismenning er upplagt, at kommunan og tað almenna er við í rakstrinum av lokalum menningarstovum og á tann hátt er við til at føra ítøkilian lokalan økismenningarpolitik, ið er grundfestur gjøgnum vitan og viljan á staðnum.

Tað kundi verið einar tríggjar økismenningarstovur í Føroyum. Hesar menningarstovur kundu verið við til at marknaðarført tey ymisku økini og hjálpt vinnufyritøkum í sambandi við messutiltøk og skipa fyri lokalum fyrilestrum, videokonferansum, gjørt kunningartilfar um økið og eina heimasíðu umboðandi økið og vinnufyritøkur tess, eins og hjálpt við til at funnið stuðulsmøguleikar í samband við verkætlanir, vørumenning o.a. .

Økismenningarstovurnar høvdu kunnað verið eitt stað har virkiseiðarar og persónar við nýggjum hugskotum kundu vent sær til og fingið ráðgeving á staðnum ístaðin fyri at skula til høvuðsstaðin.

Ikki er neyðugt, at kostnaðurin fyri at reka eina lokala menningarstovu er meira enn eina hálva mió kr. árliga. Einstakar kommunur hava sett fólk, ið partvís virka innan menning av økjunum, og tískil er tað einki øðrvísi, um tær minnu kommurnar heldur velja at stuðla einum vinnuráði ístaðin fyri at seta fólk í fulltíðarstarv.

### Føroyar í tilfeingiskreppu

Spurningurin er kanska, um vit ikki eru í einari stórari tilfeingiskreppu í dag orsaka av, at tað primert verður fokuserað upp á fimm vinnuøki – nevniliga fiskivinnu, aling, olju, KT og ferðavinnu.

Hinvegin er tað ikki áhugi fyri ígongdsetarum og ítøkiligari økismenning, men har alt druknar í álitum, kanningum, loysingartosi, partabrævamarknað og avgjøld á fiskivinnuna v.m. Harafturat er øvundsjuka og ein lítið positiv viðgerð av vinnufólkum og vinnulívinum við til at skaða vinnuumhvørvið og ígongdsetaraáhugan.

Vit í Føroyum hava sera nógv fólk við góðum vinnuhugskotum. Í dag starvast tó fleiri uttanlands og hava selt sínu hugskot til útlendsk feløg.

### Skapan av sunnum vinnubygnað

Vert er at hava í huga, at tá í tað í vesturheiminum verður tosað um at skapa arbeiðspláss og menning, so verður oftani mett, at tað er frá smáum og miðalstórum virkjum at vøksturin skal koma.

Skulu vit veruliga hava vinnumenning, og eitt veruligt ynski er, at hetta eisini skal henda í útjaðaranum, er neyðugt at fáa sett í verk ítøkiliga økismenningarráðgeving.

Tíðin er farin frá at fólk við ígongdsetaraevnum hava áhuga í at fara til høvuðsstaðin at leska sær av vitunardepulinum. Eg eri vísur í at fleiri góðar verkætlanir ongantíð síggja dagsins ljós, tí uppfinnarin ikki hevur sparringspartnarar í sínum egna øki.

Ein økismenningarstova kundi hjálpt fyritøkum og virkjum við alskyns upplýsingum, hon kundi eisini sett størri krøv til tænastuna frá almennum stovnum, og hon kundi betra um vinnuforumið kring landið. Harafturat kundu slíkar menningarstovur skapt eitt net millum føroyskar fyritøkur og fyritøkur uttanlands.

Eftir míni meting er tað upplagt, at kommunur og tað almenna er við til at stuðla tílíkar økismenningarstovur, men harvið er ikki sagt, at tað er lætt at fåa ment verandi vinnufyritøkur og hjálpt komandi virkjum í gongd. Um tað hevði eydnast, hevði hetta samstundis verið við til at fjøltátta vinnubygnaðin og harvið økt um stabilitetin í føroyska samfelagnum.

